

*Yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinasyni í ár benda á, at fiskurin á landgrunninum hevur nóg mikið av føði og er væl fyri. Avgerandi fyri gongdina frameftir verður tilgongdin av fiski – og sjálvandi royndin eftir ymisku fiskasløgunum*

*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*

# Batnandi útlit á landgrunninum

**GRANSKING Nú Havstovan er liðug við sínar yvirlitstrolingar í ár, er líkt til, at umstøðurnar hjá høvuðsfiskasløgunum á landgrunninum eru rímiliga góð, og flestu fiskasløg eru væl í holdum**

Vilmund Jacobsen

Havrannsóknarskipið Magnus Heinason hevur nú gjørt seinnu yvirlitstrolingarnar í ár, og fyribilsúrslitini eru nú tøk. Tað er Jákup Reinert, sum var toktleiðari á túrinum, ið hevur skrivað frágreiðing um úrslitini.

Í stuttum er niðurstøðan hon, at toskurin á landgrunninum er í vøkstri, batar eru at hóma fyri hýsu, og væl av makreli og rossamakreli hevur verið í føroyskum sjógvi seinastu tvey árini.

– Flestu fiskasløgini eru væl í holdum, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

Høvuðsendamálið við hesum túrum hjá Magnusi Heinasyni er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa.

– Hetta var annar túrurin við yvirlitstrolingum á sumri í ár, og hetta er soleiðis 12. árið, har gjørdir verða tveir túrar á tvær vikur og við 200 trolstøðum tilsamans. Hesar støðir liggja spjaddar kring allan landgrunnin, og tóvað verður í ein tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári.

Jákup Reinert vísir á, at 138 trolstøðir vórðu tiknar á tí fyrra túrinum, og til seinna túrin vóru tískil 62 trolstøðir eftir at taka, sum serliga lógu vestanfyri og sunnanfyri.

– Mest varð fingið av hvítingsbróður, og síðani komu upsi, hýsa, toskur, gullaksur og lítli kongafiskur. Tilsamans 47 fiskasløg vórðu veidd umframt høgguslokk, hummara, rækjur, jákupsskel og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul.

Hann vísir á, at títtleikin av ymisku fiskasløgunum var ymiskur undir yvirlitstrolingunum, men lítli kongafiskur varð fingin á 90% av teimum 62 støðunum. Síðani komu eitt nú toskur (89%), upsi (87%), hvítingsbróðir (84%), longa (79%) og hýsa (77%).

– Verða báðir túrarnir á sumri lagdir saman, vórðu 60 fiskasløg veidd tilsamans. Mest varð fingið av hýsu, og síðani koma hvítingsbróðir, upsi, toskur, lítli kongafiskur og gullaksur. Upsi varð soleiðis fingin á 90% av støðunum, toskur og hvítingsbróðir á 87%, lítli kongafiskur á 82%, hýsa á 76% og longa á 72% av støðunum.

## Ein góð mynd

Jákup Reinert sigur, at tá samanburður verður gjørdur við stovnsmetingarnar, ið verða gjørdar á hvørjum ári og við veiðitøl hjá fiskiflotanum, er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær ábendingar um, hvussu aðrir stovnar eru fyri.

Hann sigur, at tá hugt verður at toski, hevur lítið verið at fingið síðani 2003, og serliga árini 2006-2008 var lítið at fáa.

– Men í fjør bragdaði aftur, og úrslitið í ár var uppaftur betri. Hetta stuðlar upp undir framskrivingar, gjørdar í apríl-mai í ár, sum vístu, at toskastovnurin er í góðum vøkstri vegna betri fiskavøkstur og tilgongd. Tó var sera lítið fingið av 0- og 1-ára gomlum toski. Úrslitini fyri hýsu hava verið støðugt minkandi síðani 2002, og úrslitið í fjør var tað minsta síðani 1991. Tað kvinkaðist nakað uppeftir í ár, men er enn á sera lítlum støði. Men eisini her eru batar at hóma, tí fiskavøksturin er batnaður og tilgongdin, ið hevur verið sera lítil seinastu árini, tykist nú at vera betri aftur. Tað er serliga 2009-árgangurin sum tykist góður, men lítið var av 2010 árganginum.

## Tilgongdin avgerandi

Fiskifrøðingurin sigur, at hóast úrslit viðvíkjandi upsa frá tílíkum yvirlitstrolingum skulu takast við fyrivarni, benda tølini á, at stovnurin hesi seinastu 4 árini er nakað minni enn árini framman undan.

– Stovnsmetingarnar í apríl-mai vístu, at upsastovnurin, hóast hann er í minking, enn var væl fyri í 2009, og úrslitini frá yvirlitstrolingunum í summar benda á sama borðið.

Avgerandi fyri gongdina næstu árini verður, hvussu tilgongdin fer at verða, sigur Jákup Reinert, sum altso var toktleiðari á túrunum hjá Magnusi Heinasyni.

vilmund@sosialurin.fo




**Høll til leigu/sølu**
**á keiøkinum í Vestmanna**

Høllin er 22x12 metrar
1/3 er innrættaður

**Í niðaru hæddini eru:**
2 wc-rúm, eitt brúsurúm, eitt kontór, eitt stórt fýrrúm og ein gongd/trappu uppgongd

**Í ovaru hæddini er** ein stór kantina við køki

**Restin av høllini**, 15x12 metrar er verkstað.

***Áhugað kunnu venda sær til:***
Tlf. 214588 ella 218510



**TVINGSILSSØLA**

Týsdagin 5. oktober 2010, kl. 10:00, verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 15, Hvannasund (AS nr. 2-49/2010).

Talan er um eini sethús í trimum hæddum:

Húsini eru innrættað soleiðis: **Kjallari:** Kjallarin er ikki innrættaður. **Miðhædd:** Lítil durur, gongd v/ trappu uppá umframt trappa niður í kjallaran, køkur og stova í einum, baðiverilsi. **Loftið:** Gongd/stova, tvey lítil kømur. Húsini treingja til nógvar ábøtur og viðlíkahald, og einki er gjørt rundan um húsið. Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, sum kann geva nærri upplýsingar um ognina. Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur, tann 1/9-2010**